# Ríkisumboðið fær onga átalu

## Hjúnini, sum í fjør ættleiddu og síðan mistu drongin Markus, fingu einki burtur úr at kæra til Fólkatingsins umboðsmann

Randi Jacobsen

Eini ung hjún í Havn ættleiddu í fjør ein drong úr Etiopa. Drongurin æt Markus.

Tríggjar mánaðir seinni varð góðkenningin av hjúnum sum ættleiðingarforeldur tikin frá teimum, og drongurin varð tikin frá teimum.

Foreldrini vildu ikki góðtaka hetta, og tey kærdu tí til Fólkatingsins umboðsmann.

Umboðsmaðurin svaraði beinanvegin, at hann ikki fór at kanna avgerðina um at afturkalla góðkenningina sum ættleiðingarforeldur, tí hann helt seg ikki kunna hjálpa foreldrunum at fáa barnið aftur.

Hinvegin játtaði hann at kanna málsgongdina og um rætt var atborið, tá ið myndugleikarnir tóku barnið frá hjúnunum.

Umboðsmaðurin sigur, at hann ikki kann finnast at Ríkisumboðnum. Hann nevnir ein fund, sum var millum Ríkisumboðið og foreldrini, men partarnir vóru so ósamdir um, hvat kom fram á fundinum, og umboðsmaðurin sá seg ikki føran fyri at taka dagar ímillum tær ymisku frágreiðingarnar.

Hann sigur eisini, at hann einki hevur at finnast at myndugleikunum, tá ið teir tóku barnið frá hjúnunum.

Mamman, sum ættleiddi drongin, veit enn ikki, um hon heldur aðrar møguleikar vera at royna at fáa drongin aftur.

*Veitst tú eina søgu, send so SMS á 28 50 04*

Fjeppari?
Les um ítrótt í Sosialinum



Lesið Sosialin
-tað loysir seg

HAVNAR FIMLEIKAFELAG 1909

Framsýning

Amboðsframsýningin hjá Havnar Fimleikafelag verður í nýggju høllini FIMI **sunnudagin 27. mars kl. 15.00**

Yngri liðini kl. 15.00 - Eldri liðini kl. 18.00

**Havnar Fimleikafelag**

Lesið Sosialin -so eru tit við!

STUÐUL ÚR FELAGSGRUNNI

**Felagsgrunnur millum Nuuk í Kommuneqarfik Sermersooq, Reykjavík og Tórshavn**

Møguleiki verður nú aftur at søkja stuðul úr felagsgrunninum Nuuk i Kommuneqarfik Sermersooq, Reykjavík og Tórshavn. Grunnafundur verður í mai mánaði, har avgerð verður tikin um hvør fær stuðul.

Býarstýrini í Kommuneqarfik Sermersooq, Reykjavík og Tórshavn seta árliga pening í grunnin, hvørs endamál er at veita fíggjarligan styrk til tiltøk ella annað, ið kann fremja og menna samstarvið og fatanina millum hesar kommunur og borgarar teirra.

Tórshavnar býráð heitir tí á einstaklingar, feløg o.o., ið halda seg koma undir treytirnar fyri stuðli, um at senda býráðnum umsóknarblað við frágreiðing um tiltakið. Umsóknarblaðið fæst í Snarskivuni ella inni á heimasíðu kommununnar www.torshavn.fo. Tað er av týdningi, at hetta umsóknarblað verður nýtt, tá søkt verður, og at svarað verður so gjølla sum til ber.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Anva Bech, skrivara, telefon 302010.

Umsókn merkt „Fællesfond mellem Nuuk i Kommuneqarfik Sermersooq, Reykjavík og Tórshavn" eigur at vera hjá Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 20. apríl 2011.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

SØLUFÓLK TIL FØROYAPRENT

Okkara sølutoymi skal víðkast, og tí leita vit eftir einum sølufólki/ráðgeva, sum fær sum fremsta mál at hjálpa kundum okkara at røkka teirra málum. Føroyaprent hevur sum aðalmál, at allir okkara kundar kenna seg nøgdar við arbeiði og tænastustøði á virkinum. Okkara kundar eru allastaðni í landinum, og tí fer nýggja sølufólkið at arbeiða úti ein stóran part av tíðini. Hugur og hegni at arbeiða sjálvstøðugt og evni at skapa góð sambond við onnur, eru av avgerandi týdningi fyri trivnaðin í hesum avbjóðandi starvi.

**Tað er ein fyrimunur um tú hevur :**

- eina viðkomandi útbúgving innan sølu og marknaðarføring
- hevur vitan um og royndir frá grafiskum virki
- royndir við B2B sølu

**Tað er neyðugt at:**

- tú hevur lætt við at samskifta við og skilja viðskiftafólk og starvsfelagar
- tú kennir teg trygga/-n við at tingast við viðskiftafólk – og at tey kenna seg trygg við teg
- tú hevur áræði, ert álítandi, ert nærlagdur/-løgd og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- tú dugir at raðfesta og at arbeiða við fleiri málum í senn
- tú verður motiverað/-ur av kapping
- tú dugir at orða teg í talu og á skrift

Vit bjóða eitt spennandi starv á Føroya størsta grafiska virki. Okkara felags mál er at varðveita og styrkja menningina av grafiska yrkinum, so kundar okkara í dygd og tænastu altíð eru í góðum hondum. Vit vilja við hesum tryggja, at Føroyar framhaldandi hava eitt framkomið og kappingarført grafiskt virki.

- løn og arbeiðstreytir sambært avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Vilt tú vita meira, so ring ella skriva til Hansinu Dahl, sølu- og marknaðarleiðara, á telefon 594559, hansinadahl@foroyaprent.fo

**Umsóknarfreist 4. apríl 2011. Starvið verður sett skjótast gjørligt eftir hetta.**

Umsóknin skal sendast til:
Føroyaprent Pf.
Hoyvíksvegur 59
Boks 3118
110-Tórshavn
Merk umsóknina: Sølufólk

Føroyaprent – ger mun

Føroyaprent vil tryggja føroyingum eina kappingarføra prentsmiðju, har kundin veit, at hansara uppgáva er í tryggum hondum. Bæði innan grafiska uppseting, prent og bókaframleiðslu. Vit framleiða alt frá visitkortum og brævørkum til faldarar, bløð og bøkur. Á Føroyaprent ivast vit ikki í, at nýggjasta tøknin, góða handverkið og tær drúgvu royndirnar geva besta úrslitið. Føroyaprent er svanamerkt prentsmiðja.